**Uttanríkis- og Vinnumálaráðið**
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

Tórshavn, 6. februar 2019.

**Hoyringssvar frá FOÍB til 5. útbjóðing til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum**

FOÍB tekur fult undir við eini nýggjari 5. útbjóðing til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum á føroyska landgrunninum. Eingin ivi er um, at her er gjørt eitt miðvíst og gott fyrireikingararbeiði, sum UVMR/Jarðfeingi eiga stórt rós og tøkk fyri. At roynt verður at bróta upp úr nýggjum á leitiøkinum við eini nýggjari útbjóðing, har fleiri broytingar eru gjørdar í mun til seinastu 4. útbjóðing, meta vit vera sera skilagott stig at taka. Her verður ikki minst hugsað um samstarvið við bretar og ætlanina at broyta føroysku loyvistreytirnar, soleiðis at tær í størri mun líkjast teimum bretsku.

FOÍB kann yvirornað siga, at vit taka undir við flestu av niðurstøðunum og avgerðunum í útbjóðingartilfarinum, tó at vit eisini ynskja at vísa á manglar, sum vit kortini halda enn ber til at bøta um, soleiðis at útlitini til at fáa eina væleydnaða útbjóðing kunnu gerast uppaftur betri.

Tað gongur nevniliga aftur sum ein reyður tráður í viðmerkingunum til útbjóðingarumfarið, at ongar broytingar verða gjørdar í skattaskipanini. Víst verður samstundis á, at hon er so gott sum tann sama, sum varð galdandi undir ávikavist fyrstu, aðru, triðju og fjórðu útbjóðing. Náttúrligt er tí at spyrja, um uppskotsstillarin tá heldur, at verandi skipan er eins góð og vælegnað í dag, sum hon var fyri skjótt 20 árum síðani, tá grundarlagið varð lagt undir føroyska oljuleiting sum heild, og umstøðurnar eisini vóru øðrvísin enn í dag.

Tað hevur eisini verið nevnt, at tað hevur verið og er ein styrki fyri Føroyar og føroyska oljuframtíð, at vit vísa oljuumheiminum, at vit megna at varðveita verandi skipanir og ikki broyta tær í tíð og úrtíð alt eftir, hvat vit sjálvi ynskja at fáa burtur úr. Vitandi, at tað sjálvandi er gott at hava støðugar (stabilar) skipanir, so loyvir FOÍB sær at ivast í, tá kringumstøðurnar broytast nógv, um tað er rætt at tvíhalda um 20 ára gamlar skipanir. Vit skulu heldur ikki gloyma, at vit hava tann stóra fyrimun fram um nógv lond kring heimin, at vit hava trygg og stabil politisk viðurskifti, eitt gott undirstøðukervi og sum heild eitt væl útbygt samfelag. Hesi jaligu viðurskifti kunnu saman vera við til at tryggja, at vit fáa eina "win/win" støðu, tá avtalur verða gjørdar millum føroyska samfelagið og útlendsku oljufeløgini.

FOÍB er onga løtu í iva um, at føroyska samfelagið skal hava sín náttúrliga ágóða av eini framtíðar olju- og gassframleiðslu. Men fyri at skapa eitt grundarlag undir eini slíkari, so er fyrst neyðugt at leita eftir og finna kolvetni í undirgrundiní í lønandi nøgdum. Og tað er ein sannroynd, at hetta gerst bert við at fáa útlendsk olju- og íløgufeløg at gera íløgur í føroyska oljuleiting. Hetta hevur borið til áður og eigur eisini at bera til í dag, tó at umstøðurnar í dag

eru øðrvísi. Vit mugu so eisini taka hædd fyri, at føroyska økið er í kapping við onnur leitiøki kring heimin. Eru vit ikki kappingarfør í nógvar og ymsar mátar, fara oljufeløgini at hyggja eftir øðrum økjum enn okkara og tá møguliga velja Føroyar frá.

Tað er tí ein spurningur um – nú 5. útbjóðing stendur fyri durum - at gera okkara øki so mikið áhugavert og kappingarført, at oljufeløgini velja at gera íløgur her heldur enn bara aðrastaðni. Og til tess at røkka hesum máli royna vit so at gera ymsu treytirnar so áhugaverdar og átuligar fyri oljufeløgini sum tilber. Í seinastu 4. útbjóðingini var lítil og eingin áhugi fyri at bjóða. Tá vóru so gott sum ongar broytingar heldur gjørdar í ymsu treytunum í mun til undanfarnu útbjóðingarnar. Hetta gjørdu vit eisini vart við í okkara hoyringssvari tá: at broyttar umstøður kravdu av okkum, at vit slakaðu uppá onkrar av treytunum. Men sigast skal eisini, at tá vóru tað eisini aðrar umstøður, sum vit ikki høvdu ávirkan á, ið vóru partur av orsøkini. Her fyrst og fremst avleiðingarnir av brotasjógvunum frá brádliga prísfallinum í 2014, sum tók grundarlagið undan eitt nú leiting kring allan heim.

Nú mangt bendir á, at vit hava lagt hesar brotasjógvar aftur um okkum, og oljuprísurin aftur er komin í eina betri og tryggari legu, og oljufeløg aftur eru farin at gera íløgur í leiting, eisini her í útjaðaraøkjum, so áttu møguleikar at verið fyri eini meira hepnari útbjóðing her um leiðir eisini. Við hesum í huga og tí vaksandi virksemi, sum er eystanfyri føroyska markið, hava okkara myndugleikar so víst bæði dirvi og gott hugalag og hava sett út í kortið av nýggjum – enn einaferð. Tað kunnu vit í FOÍB bara taka fult og heilt undir við. Eins og við flestu av teimum broytingum, sum longu eru skotnar upp.

Men vit vilja tó minna okkara myndugleikar á, at helst eru hesar broytingar og komandi samstarv við bretar einsamalt, ikki nóg mikið til, at vit kunnu vænta at fáa eina fult út væleydnaða útbjóðing. Helst – og tað er eisini tað vit hava hoyrt oftani frá oljufeløgum – er neyðugt at gera onkrar broytingar í skattaskipanina eisini. At slíkar møguliga kunnu koma seinni meta vit vera at taka ein alt ov stóran váða. Nettup tí, at júst henda útbjóðingin hevur so stóran týdning, m.a. tí hon sampakkar við komandi bretska útbjóðing hinumegin markið, halda vit, at tað er neyðugt at tryggja seg uppaftur betur, soleiðis at eingin ella lítil ivi verður um úrslitið av útbjóðingini.

**Uppskot til broytingar**
Uppskotsstillarin nevnir í viðmerkingunum til uppskotið serstakliga tveir partar av skattaskipanini, sum hann kortini ikki ætlar at broyta. Tann eini er spurningurin um framleiðslugjald (royalty), sum er 2% og síðani hin, sum er partafelagsskatturin uppá 27%. Okkara tilmæli er kortini at lata upp aftur fyri viðgerðini av júst hesum og vita, um ikki ber til at loysa upp fyri onkrari broyting her.

1. **Javnstilla partafelagsskattin**
   *Í dag skulu útlendskar fyritøkur, sum vilja leita eftir olju og gassi við Føroyar og seinni fara undir framleiðslu, rinda 27% í partafelagsskatti. Sami partafelagsskattur er harafturímóti 18% fyri føroyskar fyritøkur. Er tað skilagott, um man ynskir eina væleydnaða útbjóðing, at varðveita henda stóra munin? Vit kunnu her eisini minna á, at útlendskar fyritøkur, sum vilja gerast partur av FAS-skipanini, rinda í dag 18% í partafelagsskatti. So tað er longu presedens fyri, at útlendskar fyritøkur verða javnstillaðar við føroyskar, tá tað um partafelagsskatt og shippingvinnu ræður. Er tað yvirhøvur rætt og skilagott at gera mun á teimum og øðrum útlendskum fyritøkum, sum vilja gera íløgur í føroyska oljuleiting? FOÍB heldur, at okkara myndugleikar eiga at umhugsa at broyta skipanina við partafelagsskatti soleiðis, at føroyskar fyritøkur og útlendskar oljufyritøkur verða javnstillaðar og rinda sama prosent í partafelagsskatti.*

   *Ein avgerð um at javnstilla partafelagsskattin ella í hvussu er minka um stóra munin uppá umleið 9%, hevði verið eitt sera gott signal til oljufeløgini, nú tað ræður um at sannføra tey um, at tað er skilagott at gera íløgur í leiting í einum lutvíst ókendum útjaðaraøki sum tí føroyska landgrunninum.*

2. **Strika ella minka framleiðslugjaldið**
   *Í øðrum føri meta vit, at tað hevði verið vert at umhugsað enn eina broyting í skattingini av oljufeløgunum, nevniliga at strika ella møguliga minka um framleiðslugjaldið, royalty, sum í dag er 2%. Okkum kunnugt er støðan tann í dag, at oljufeløg í Bretlandi rinda 40% í marginalskatti. Okkara marginalskattur er góð 57%. Tað hevur hann verið í 20 ár. Tann bretski var 50% í 2016. So meðan bretar, sum hava eina stóra olju- og gassframleiðslu, broyta skattin, tá umstøður broytast og framleiðslan minkar, tá varðveita vit okkara skatt, sum framvegis er 57% av ongum. Ein kundi hóskandi spurt, hví oljufeløg skulu gera íløgur í einum enn ókendum og harvið váðafullum øki sum okkara, har skattingin er góð 17% hægri enn í grannalagnum, har stórar nøgdir av olju og gassi longu eru funnin og verða framleidd!*

3. **Keikanturin ikki tíðarhóskandi**
*FOÍB er eftir drúgva umhugsan komin til ta niðurstøðu, at kravið til oljufeløgini at brúka føroyskan keikant í sambandi við oljuleiting, er ikki tíðarhóskandi longur. At hetta var skilagott og eitt týðandi stig at taka, tá føroysk oljuvinna var í síni føðing, merkir ikki, at hetta kravið gagnar komandi leiting. Vit kunnu staðfesta, at keikanturin hevur verið til stórt gagn fyri føroyska vinnu og samfelagið, men tað er tíverri eisini ein sannroynd, at tvíhaldan um hesa skipan kann eisini leggja fótonglar fyri einari náttúrligari oljuleitimenning, har boring av brunnum er alfa og omega. Her hvílir tí stór ábyrgd á okkara myndugleikum, sum ynskja eina væleydnaða útbjóðing, at tryggja, at sjálv boringin av brunnum kemur í fyrstu røð. Tí uttan leitibrunnar, eingin oljuframtíð, heldur ikki hjá vinnuni.*

*Tá tað í 5. útbjóðing verður róð framundir at skapa umstøður fyri føroyskari vinnu eisini í sambandi við framtíðar leiting og oljuvirksemi, so meta vit hetta vera sera skilagott. Spurningurin er bara, hvussu hetta verður best fráfarið, um somu tíð, sum tað skal gagna eini komandi leiting. Føroysk vinnuluttøka í eini oljumenning á Atlantsmótinum er ein av framtíðar hornasteinunum í avleidda virkseminum frá boringum serliga. Men tað má vera vinnuluttøka í breiðastu merking í øllum liðum. Heldur enn at stara seg blindan uppá kravið um keikant, ið møguliga kann gerast ein forðing fyri boring av brunnum í eini leitifasu, heitir FOÍB tí á myndugleikarnar at vísa fleksibilitet í keikantsmálinum og heldur hugsa føroyska vinnuluttøku í breiðari merking.*

*Lærdómurin frá royndunum við keikanti er tann, at tá farið verður undir útbyggingar og framleiðslu, tá eigur hetta at vera so mikið væl lagt til rættis, at føroysk vinna er ein náttúrligur partur av menningini. Kortini meta vit, at tað er so altavgerandi nú at fokusera 100% uppá at fáa brunnar boraðar og sleppast má undan flestu ella øllum millumliðum, sum kunnu gera boringina minni attraktiva.*

*Vit leggja upp til at samstarva við bretskar myndugleikar og vóna, at feløgini, sum arbeiða hinumegin markið, eisini fara at vísa áhuga fyri okkara øki. Skal tað tí vera nakar logikkur í einum samstarvi um markið, so má møguleiki eisini vera fyri – uttan krav um føroyskan keikant – at oljufeløg kunnu flyta boripallar og boriskip um markið og tískil kunnu koma til at bora á føroyska landgrunninum uttan stórvegis forðingar ella meirkostnað. Út frá hesum mælir FOÍB myndugleikarnar til aftur at venda spurninginum um keikantin og seta hann í nútíðar ljós heldur enn at varðveita eina skjótt 20 ára gamla skipan, sum var góð tá, men sum í dag hevur tørv á at verða endurnýggjað. Fer slík gongd at skunda undir fleiri boringar, tá fer tað fleirfalt at gagna føroyskari vinnu uppá longri sikt. Vilja vit føroyskari vinnu væl í dag, gera vit meira fyri hana við at taka keikantin burtur úr treytunum. Vinnan er nevniliga meira búgvin nú, og vit hava sæð, at hon stendur seg í kappingini á fría marknaðinum.*

*Keikantstreytirnar vórðu settar inn, tá Føroyar vóru í einum seljarans marknaði viðvíkjandi olju og gassi, har myndugleikarnir kundu diktera treytir. Nú eru vit í einum keyparans marknaði.*

*Harafturat tørvar føroyskum veitarum ikki slíka verjulóggávu longur. Føroyskar fyritøkur megna at kappast á einum fríum marknaði og klára at vinna sáttmálar, ikki bert sáttmálar frá feløgum, ið eru virkin á føroyska landgrunninum, men eisini sáttmálar frá feløgum, ið virka bretsku megin markið.*

**Skilagott samstarv við bretar**

Tá hetta er sagt vilja vit undirstrika, at FOÍB tekur undir við flestu av grundgevingunum og tilmælunum í vælundirbygda útbjóðingartilfarinum. At føroyskir myndugleikar, sum nakað heilt nýtt, hava tikið upp samband við bretskar myndugleikar um samstarv á leitiøkinum, er einki minni enn eitt sera skilagott og vónandi eisini týðandi vegamót í føroyskum oljuleitipolitikki. Eitt stórt herðaklapp fyri hesa nýhugsan. Hetta er eisini fult í tráð við tann málsetning og tað arbeiði, sum FOÍB hevur sett sær fyri og gjørt seinastu árini, nú leitingin og eisini framleiðslan á bretska landgrunninum vestan fyri Hetland økist og nærkast føroyska markinum. Tá er upplagt hjá Føroyum at taka stig til samstarv við grannarnar við tí fyri eygað at menna ein nýggjan olju- og gasslandslut millum Hetland og Føroyar. Sí eisini viðheftu strategiætlan fyri Atlantsmótið, ið FOÍB legði upp til longu í 2017.

At bretskir myndugleikar longu hava sæð hesa jaligu framtíðar gongdina á Atlantsmótinum er eyðsæð, tí longu frá 2030 meta teir nevniliga, at allar ella flestu skattainntøkurnar frá olju- og gassi í bretsku undirgrundini fara at koma frá leiðunum vestan fyri Hetland, tvs. millum Hetland og Føroyar. Júst henda sannroynd eigur at geva okkum í Føroyum nakað at hugsa um. Og uppskot til 5. útbjóðing er so eitt ítøkiligt prógv um, at okkara myndugleikar taka málið til sín í størsta álvara.

Útbjóðingartilfarið ger nógv burtur úr at greiða frá hesum samstarvi, sum í stóran mun verður reyði tráðurin í komandi leiting báðumegin markið. At gera brúk av bretskum royndum og vitan beint hinumegin markið er bæði náttúrligt og sera skilagott. At bjóða út øki báðumegin markið sum somu tíð og í mongum førum undir somu treytum er eisini skilagott. Somuleiðis er skilagott at marknaðarføra 32. útbjóðing í bretskum øki og 5. útbjóðing í føroyskum øki eitt bæði djarvt og rætt stig at taka. Við hesum verða møguleikar skaptir fyri eini “win/win” støðu fyri bæði londini. FOÍB ynskir við hesum at takka føroysku myndugleikunum fyri at hava gjørt eitt gott heimaarbeiði og sett út í kortið eina kós, sum kann betra munandi um møguleikarnar fyri, at komandi útbjóðingin verður væleydnað. Men FOÍB loyvir sær samstundis at vísa á manglarnar í útbjóðingini.

**FOÍB og føroyska framtíðin**

Til hetta hoyringssvar halda vit eisini hoyra nøkur orð um FOÍB og tess arbeiði. FOÍB, Føroya Oljuídnaðarbólkur, umboðar fyrst og fremst oljufeløg, sum vilja vera partur av føroysku leitingini men sum eisini í dag arbeiða eystan fyri markið. Felagið hevur skjótt 20 ár á baki og heldur, at tað eisini hevur stóran týdning fyri Føroyar og føroyskt oljuvirksemi/vinnu sum heild, at tað er partur av oljuumhvørvinum og ger eitt arbeiði, sum kann gagna bæði útlendsku olju- og íløgufeløgunum umframt føroyska samfelagnum. Tað er okkara meting, at nú olja og gass eru í undirgrundini tætt við markið, so eigur eisini at bera til at finna kolvetni í okkara undirgrund skamt frá bretsku olju- og gasskeldunum.

FOÍB sær eisini stóran týdning í tí arbeiði, sum m.a. oljufeløg í dag gera fyri at menna varandi orkukeldur. Tó er tað okkara áskoðan, at heimurin fer at hava tørv á bæði olju og gassi í mong tíggju ár aftrat, og her kann føroyska oljan og gassið gera ein mun, tó at tað neyvan fer at verða talan um stórt tal av keldum, sum verða funnar og útbygdar.

Heiminum tørvar olju og gass – nógva olju og nógv gass. Hvønn dag brúkar heimurin góðar hundrað milliónir tunnur av olju. Tað talið er vaksandi í absuluttum tølum. Hetta er ein sannroynd, sum tíverri ikki er almenn vitan.

Í løtuni eru á leið ein triðingur av heimsorkutørvinum nøktaður av olju, ein lítil triðingur av koli og á leið ein fjórðingur av gassi. So er restin kjarnorka, vatn og onnur varandi orka.

Um vit ikki síggja onkra teknologiska kollvelting tey næstu árini, so er ivasamt, um varandi orka nøktar nógv meir enn 15 - 20% av heimsorkutørvinum í 2030.

At leita eftir olju og gassi er sostatt ikki eitt val, men nakað, sum er alneyðugt fyri at nøkta framtíðar orkutørvin.

Fyri føroyska samfelagið og búskapin meta vit eisini, at oljuleiting her kann fáa týdning í framtíðini. Verða lønandi fund gjørd, hvat vit ikki ivast í, tá kunnu hesi gerast eitt nýtt búskaparbein at standa á hjá komandi ættarliðum. Við teimum royndum og vitan, sum vit longu hava frá svikaligum fiskastovnum og alivinnu, tá er greitt, at olju- og gassvinna saman við teimum hjávinnum hesar skapa, kann gerast ein nýggjur táttur í okkara búskapi. Men fyri yvirhøvur at kunna røkka hesum málum, tá er neyðugt at leita og tvs. at bora brunnar á landgrunninum.

5. útbjóðing er eitt týðandi stig á júst hesi leið, sum vit taka fult undir við saman við teimum broytingum, sum eru skotnar upp. Kortini vísa vit eisini til aðrar broytingar og heita inniliga á okkara myndugleikar um at hyggja nærri at hesum, tá seinasta hond verður løgd á útbjóðingina.

Ein høvuðsorsøkin til at 5. útbjóðing kemur til røttu tíð og á rætta stað er tað virksemi, sum hevur tikið seg upp beint hinumegin markið. Tað ræður nevniliga um at gera brúk av tí momentum, sum í dag er bretsku megin markið, har fleiri av heimsins størstu oljufeløgum saman við íløgufeløgum hava valt at brúka orku og pening til bæði leiting og útbyggingar. Og sum vit vita eisini í løtuni hyggja yvir um mark.

Skulu vit bara standa og hyggja at, meðan hesir oljurisar seta borarnar í undirgrundina skamt frá markinum? Ella skulu vit, sum víst á omanfyri og sum okkara myndugleikar so skilagott hava víst á við enn eini útbjóðing – vera við til at troyta hetta sera jaliga momentum og gerast partur av framtíðar oljuvirkseminum á Atlantsmótinum!

Júst í hesum døgum verður heimsins størsti boripallur “Ocean GreatWhite” gjørdur klárur í Skotlandi til at bora tríggjar týdningarmiklar brunnar skamt frá føroyska markinum. Hetta arbeiðið byrjar í mars, og í summar vita vit uppaftur meira um møguligar olju- og gassgoymslur tætt við føroyska landgrunnin.

Tað er rætt av okkara myndugleikum við Jarðfeingi og UVMR á odda at taka signalini frá altjóða oljuvinnuni, sum arbeiðir hinumegin markið, í største álvara. Bera vit okkum rætt at og fremja tey tiltøk, sum eru neyðug fyri at vekja áhugan hjá oljufeløgunum fyri føroyska landgrunninum eisini, tá eru vit á rættari kós. Tá leggja vit grundarstøðið undir eina komandi føroyska oljuvinnu. Leitivirksemi á landgrunninum, her serstakliga borivirksemi, vita vit av royndum, hevur stóran týdning fyri bæði arbeiðspláss og inntøkur til landskassan. Ein boring setir nógvar ringar í sjógvin, soleiðis at ikki minst okkara veitaravinna, sum í dag er á einum sera høgum og kappingarførum støði, kann gerast uppaftur meira virkin og harvið eisini ein meira týðandi inntøkukelda fyri samfelagið.

Vit eiga ikki heldur at gloyma, at oljuvirksemið, sum kom í kjalarvørrinum á teimum níggju brunnunum, ið vórðu boraðir frá 2001 til 2014, skapti hópin av nýggjum arbeiðsplássum bæði á sjógvi og á landi, ja skapti eina oljuvinnu uttan nakra olju! Við nýggjari leiting á landgrunninum sambært 5. útbjóðing kunnu vit fara at uppliva júst sama útvikling við bæði arbeiði og inntøkum til samfelagið. Tað kann so eisini aftur skapa nýggjar umstøður hjá mongum av teimum føroyingum, sum í dag virka uttan fyri landoddarnar. Ein *leitifasa* kann taka mong ár, og verða olja og gass funnin í lønandi nøgdum eftir boring, tá fer ein *útbyggingarfasa* so aftur at skapa arbeiðspláss og inntøkur til samfelagið, fyri so ikki at tala um endaliga stigið, *framleiðslufasuna*: te. framleiðsla av kolvetnum, sum tá bæði kunnu koma eftirspurningi á heimsmarknaðinum og einum føroyskum búskapi til góðar.

Óneyðugt er at leggja nógv meira aftrat tí vælundirbygda tilfari, sum liggur til grund fyri 5. útbjóðing. Her verður víst á nógvar menningarmøguleikar av ymsum slag. Tó vilja vit serliga gera vart við tann stóra týdning, sum atlitini til eitt reint umhvørvi og trygd og annars onnur samfelagslig atlit hava.

FOÍB vónar eisini og vil fegið í hesum hoyringssvari, at 5. útbjóðingin fer at skapa eitt framhaldandi gott grundarlag undir tí góða dialogi og samstarvi, sum longu hevur verið millum FOÍB og føroyskar myndugleikar. Væl vitandi, at vit hava ymsar og týðandi uppgávur at røkja hvør sær, so ræður eisini um at byggja brýr og halda fram við tí konstruktiva dialoginum. Hóast vit eisini umboða ymisk áhugamál, so hava vit eina felags stevnu og endamál: at finna føroysku oljuna og gassið.

FOÍB bjóðar seg fram at gerast eitt framhaldandi aktiv í leitingini eftir olju og gassi og geva sítt íkast til ta samfelagsmenning, ið kann koma burtur úr. Við skrivstovu í hjartanum á høvuðsstaðnum, og við fakfólki bæði her og í Bretlandi, meta vit okkum at kunna veita tænastur til oljufeløgini og aðrar aktørar í vinnuni, sum samfelagið ynskir skulu vera partur av komandi leiting og harvið kenna seg væl her, umframt til føroyska samfelagið tvs. bæði myndugleikar, vinnu og til almenningin. Ein partur av hesum tænastum er tann føroyski oljuportalurin oljan.fo, sum framhaldandi fer at kunna allar føroyingar um, hvat bylgist í bæði heimliga og altjóða oljuheiminum.

**Samanumtøka**
FOÍB tekur fult og heilt undir við eini 5. útbjóðing til leiting eftir kolvetnum. Vit halda, at myndugleikarnir hava gjørt eitt stórt og gott arbeiði til frama fyri eini nýggjari útbjóðing við eitt nú at taka upp samstarv við Bretland og at harmonisera føroyskar leititreytir við tær bretsku, nú bæði londini arbeiða í einum og sama øki, Atlantsmótinum. Vit mæla tó til, at tað eisini verða gjørdar broytingar í skattaskipanini, so eisini hon í størri mun enn í dag sampakkar við hana hjá grannanum. Eisini meta vit treytirnar um keikantin at vera ótíðarhóskandi.

Verða hesi mál nádd, so síggja vit fyri okkum eina munagóða marknaðarføring á rætta stað og til røttu viðkomandi, og sum eisini verður lagt upp til saman við bretskum myndugleikum. Tað alt hetta snýr seg um í hesum førinum er at fáa brunnar boraðar, so olja og gass kunnu staðfestast í rakstrarvedugum nøgdum í føroysku undirgrundini.

Tað er okkara vón, at politiska skipanin í Føroyum tekur væl ímóti hesum so týðandi stigi frá landsstýrismanninum í Uttanríkis- og Vinnumálum, Poul Michelsen, sum 5. útbjóðing er – og eisini hyggur at ráðum okkara.

Virðingarmest

**FOÍB**

**Jan Müller**
stjóri